SOSIALURIN

FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐRALAG

NR. 40.

LEYGARDAGIN
4. OKTOBER 1958

31. ÁRG.

ERLENDUR SVÍKJUR 12-MÍLAMARKIÐ

ERLENDUR og D. P. viðganga, at sáttmálin av 1955 er í gildi, og at hann ikki kann broytast fyrr enn í 1967, uttan so er, at bretar vilja ganga við til tess.

Og kortini vilja Erlendur og tjóðveldismenn ikki vera við í samráðingum um at fáa henda sáttmála burtur.

Við hesari stoðu hevur Erlendur og hansara menn svikið kravið um 12-milamarkið!

Vistu vit ikki tað, at Erlends einasta mál og mið við skriving síni í sjómarksmálinum var fyri hvønn pris at skapa eina stemningsherðslu fyri **loysingini,** var tað ilt at skilt eitt orð av allari hansara skriving.

Men vit vita, at hjá honum og loysingarmonnum øllum verður sjómarksmálið nýtt akkurát sum tað fellur teimum fyri best at tæna loysingini, og at tað als ikki dettur teimum í huga at vera sakligir fyri at vinna hitt mesta fyri fiskimannin, og so skilja vit, hví atburður og skriving Erlends er so burtur úr vón og viti og øllum skili.

Hvør kann t. d. finna samljóð í ti, at Erlendur og 3 aðrir tjóðveldismenn ikki á tingi greiddu atkvøðu fyri 12 milamarkinum, hóast honum av Dánjal Nolsøe og øðrum kønum monnum varð sagt, at tað var tað mesta, sum vit og íslendingar kundu krevja?

Tað var sanniliga ikki í ynskinum at fremja sjómarksmálið, men einans fyri at skapa ein loysingarstemning, at hann og fylgisneytar gjørdu hetta.

Erlendur veit, um hann vil fremja sjómarkskravið, at tað er alt um at gera at fáa avtikna sambandsins og fólkaflokksins fiskimarks sáttmálaógerðina av 1955 — og hann veit og hevur viðgingið tað í orðaskifti á nevndarfundi, at 1955 sáttmálin er í gildi til 1967 og kann ikki fara úr gildi uttan bretar góðvilligir ganga við til tess, **men kortini** ikkibara vilja hann og hansara menn ikki fara á samráðingar fund við bretar, men hann og teir skira allar — danir sum føroyingar — sum royna at fáa samráðingar um avtøku av 1955 sáttmálanum, fyri svíkjarar og verður við at meyla um, at danir skulu seta 12-milamarkið uttan samráðingar við bretar. Hann veit, at hetta er ólógligt. Hann veit, um danir gjørdu tað, at tað við minsta orðið frá bretum — við 1955 sáttmálanum í hondum — vil verða dømt sum ólógligt við ein internationalan dómstól. Hann veit, at halda ella ikki halda 1955 sáttmálan hevur einki at gera við tann principiella sjómarksspurningin. — 1955 sáttmálin er ein serspurningur, ein seravtala, ið má burtur fyrst, áðrenn vit einsíðugt kunnu flyta sjómarkið út.

Og 1955 sáttmálin er ein spurningur, ein seravtala, sum bara bretar og føroyingar og danir kunnu avtaka, um allir partar kunnu verða samdir um avtøku.

Tá ið nú hvørki fólkaflokksmenn ella Erlends menn vilja tala við bretar, hava teir sett seg uttanfyri alla ávirkan, og um javnaðarmenn gjørdu sum teir, var øll vón úti fyri, at nakað hendi við sjómarksmálinum eins og við spurninginum um friðing av gýtingargrunnunum fyrr enn 1967.

Men um Erlendur slapp einsamallur at rongja og oysa úr illgitingarbrunninum fekk hann kanska loysingina og setti føroyingar berar:

riknir úr Íslandi, rættleysir í Grønlandi og við einum 3-milamarki í Føroyum til 1967.

Heldur 3-milamarkið til 1967, avreiðing av grønlandsrættindunum og loysing enn eina loysn av fiskimarksspurninginum uttan loysing og uttan avreiðing av grønlandsrættindunum.

Tað er Erlends og tjóðveldisins stoða.

Útvarpið

4.—10. oktober 1958.

Leygardagin 4. oktober:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi og tónleikur.
kl. 1830—1840: Veður og tíðindi.
kl. 1840—1900: Eitt sindur um útvarpsskránna.
kl. 1900—1930: Leygarkvøldsyrking. »Gekk eg fram við glugga tín« eftir Regin Dahl. Martin Fjørdal lesur. Tónleikur.
kl. 1930—2000: Bókaummæli. P. W. Håberg um bókina »Ein rødd« eftir Óla Reinert. — Tónleikur.
kl. 2000—2100: Leygarkvøldssending. Ungmannadeild NIOGT's hevur lagt til rættis.

Sunnudagin 5. oktober:
kl. 1500—1645: Kvøðuljómar.
kl. 1650—1700: Veður og tíðindi.
kl. 1700—1800: Gudstænasta. Lestur eftir Gudmund Brun. Z. Sørensen lesur.

Mánadagin 6. oktober:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi og tónleikur.
kl. 1830—1915: Veður og tíðindi. Lættlig grammofontónaløg. Th. P. Christiansen.

Týsdagin 7. oktober:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi og tónleikur.
kl. 1830—1915: Veður og tíðindi. Á ferð í Noregi. Erlendur Patursson.

Mikudagin 7. oktober:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi og tónleikur.
kl. 1830—1915: Veður og tíðindi. Páll J. Nolsøe: Úr Suðuroyar siglingar søgu III.

Hósdagin 8. oktober:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi og tónleikur.
kl. 1830—1915: Veður og tíðindi. Ein útiseti.

Friggjadagin 9. oktober:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi. — Uttanríkispolitisk evni.
kl. 1830—1915: Veður og tíðindi. Grammofonkonsert.

Landið fólksins

Tað er eingin meining í, at traðarmenn skulu striðast meira enn teir eru mentir — ofta alt sítt lív — at grønka landið, og so skulu aðrir hava rætt til at reka seyðin inn á bø teirra og fara við gróðrinum, ið hevur kostað traðarmanninum so nógv arbeiði.

Hesum himnarópandi órættvísindum hava **javnaðarmenn** barst ímóti, síðan teir komu á ting; men hinir flokkarnir hava alla tíðina verið ímóti.

Okkara ófrávikiligu krav hevur verið og er:

Allir traðarmenn skulu hava rætt til økeypis at vetrafriða taðir sínar.

Traðarmenn! Fylkist tí um **javnaðarflokkin!**

Fólkatryggingin.

Tá javnaðarflokkurin hevur reist hetta mál, er tað m. a. tí, at sosialløggávan er felagsmál, har Føroyar og Danmark gjalda hvør sína helvt.

Danmark hevur nú fingið fólkatrygging, soleiðis at øll gomul nú kunnu fáa 5400 kr. árliga uttan mun til inntøku. Sambandið, tjóðveldið og fólkaflokkurin hava verið ímóti - teir síta teimum gomlu, aum gjognum eitt langt lív hava tænt fólki og landi, livilig kor á ellisárunum; men hetta er tó ikki at undrast yvir, tí hesir somu flokkar hava verunliga altíð verið ímóti, tá rátt hevur um at veitt teimum gomlu hampuliga ellisrentu.

Málið hevur verið felt; men sum við øllum øðrum javnaðarmannamálum verður eisini hetta at sigra at enda.

Afturhaldsflokkarnir eru nú gingnir við til at viðgera málið, ið nú verður goldið í ellisrentu.

Hjálp teimum gomlu! Gevið teimum ein tryggan aldurdóm!

FYLKIST UM JAVNAÐARFLOKKIN!

Samráðingar

Frá ríkisumboðnum hava vit fingið sendandi:

»Udenrigsministeriet meddeler: Efter aftale med den britiske regering vil en dansk delegation under ledelse af finansminister Viggo Kampmann rejse til London for torsdag den 2. oktober 1958 at genoptage drøftelserne om det færøske fiskerigrænsespørgsmål.

Den danske delegation vil foruden finansministeren bestå af: Direktør Nils Svenningsen, udenrigsministeriet, departementchef J. Elkjær Larsen, statsministeriet, og kontorchef Troels Oldenburg, udenrigsministeriet.

Desuden vil som sagkyndige i færøske fiskeriforhold deltage:

Dr. phil. Erik Bertelsen, Danmarks fiskeri - og havundersøgelser, og spesielt udpeget af Færøernes landsstyre: Magister Jacob Sverre Joensen og Havnebetjent Poul A. Andreasen.«

BLUFF

Tjóðveldismenn — 4 av teimum — vildu ikki ganga við til semingina í fiskimarksmálinum.

Teir vóru ímóti 12 míla markinum. Hesir 4 og so Bretar eru teir einastu, ið beinleiðis hava verið ímóti hesi útflytan.

Tjóðveldismenn siga nú, at við at yvirtikið málið ella við beinleiðis loysing kundu vit longu havt fingið fiskimarksmálið loyst.

Hetta er sjálvandi bluff alt saman.

Hvørki yvirtøka ella loysing góvu okkum nakað 12 míla mark; tí 12 ára sáttmálin var í gildi kortini, og uttan mun til, um vit eru frá ella hjá Danmark, eru vit bundnir av honum fram til 1967, um ikki Bretar vilja lata hann fara úr gildi.

Ísland var leyst frá Danmark í 1944; men 1901 sáttmálin var í gildi. Ikki fyrr enn tíðin var úti, sluppu Íslendingar undan sáttmálanum, og tá Íslendingar við góðari sjóverju ikki eru førir fyri at verja nýggja markið, hvat skuldu vit tá gjørt við okkara vána sjóverju?

Nei, hvørki yvirtøka ella loysing vildi ført okkum eitt vet longur; hvørki annað ella annað vildi verið eitt einasta stig framá til loysn fiskimarksmálsins.

Uppstillingsfundur

Javnaðarflokkurin í Eysturoy hevur uppstillingarfund í Gøtu sunnudagin 5. oktober kl. 4 sp. — Møtið fjølmentir.

Bøtti fyri skaðan

Lítið verd er okkara vanlukkutrygging. —

Maður var so óheppin at bróta beinið í Grønlandi. Hann var sjúkur og óarbeiðsførur eitt heilt ár.

Allar útreiðslurnar av sjúkraupphaldinum og øðrum mátti hann gjalda sjálvur, og tá hann vendi sær til sakførara, varð einasta úrslitið burtur úr hesum, at hesin »miskunnsami« løgfrøð ingur fór við 300 kr. aftrat.

Hann fekk einki oyra í skaðabót, men mátti gjalda 1400 kr.

Her á landi átti hann onga trygd, og ta trygd, vit kundu havt vunnið okkara fiskimonnum við limaskapi við arbeiðarafjøldina í Danmørk, hevur tað higar til eydnast loysingarmonnum at forkomið.

Lat okkum forkoma afturhaldinum og loysingini, ið einans hava framt misgerðir móti fiskimannastættini!

KVETTIÐ hungursbandið

Í 1930'unum vóru ringar tíðir. Ein hópur av arbeiðs- og fiskimonnum vunnu minni enn teir brúktu. Hungur og hall var í mongum heimi. Ov lítið var til matna, klædna og til húslig endamál.

Vit hava dømi um, at tað vóru ár, har bert 3 fiskimenn í meðalstórari bygd vóru førir fyri at rinda handilsmanninum fyri neyðsynjarvørurnar, tá ið árið var farið.

Aftaná bardagan vóru tað bygdir, har 80 pst. av arbeiðsfólkinum einki arbeiði hevði.

Frá trongdarárunum í 30'unum og frameftir hava JAVNAÐARMENN virkað fyri, at vit fingu løggávu um arbeiðsloysiskassar og arbeiðsloysisstuðning; men afturhaldið hevur altíð verið ímóti.

Fellið teir hin 8. november!

1. oktober fór prístalið 9 stig upp. Men tað er ein stórur spurningur, um tað ikki átti at verið farið enn meira upp. Vit kunnu í hesum føri nevna, at vøruprísirnir verða roknaðir eftir tí, vørurnar kosta frá 1. til 15. í síðsta mánaðinum í hvørjum fjórðingsári. 15. sept. fóru prísirnir upp á breyðí; men henda hækkan verður ikki roknað við. Í hinum fyrra fjórðingsárinum vórðu prísirnir á eplum settir til nokur og 50 oyru, men teir fóru upp í millum 2 og hálva triðju krónu, meðan prístalið varð útroknað. Nú er hesin prísur niður aftur farin, so henda hækkan er ongatíð roknað við í prístalinum.